## Dagbókin - 10.b í Vestmanna skúla skrivar:

**Góða dagbók!**

Tað hendi okkurt keðiligt í nátt, og nú sita vit, bygdafrellurnar, uttan fartelefonir, mist pengamappurnar og eitt sindur av sjálvsálitinum reyk við eisini.

Fóru tvær niðan í badminton høllina at lurta eftir góðu gomlu Kjølum, komnar inn, fóru vit beina leið í garderobuna, men har var einki pláss eftir, og tá ið ein hevði goldið 120 kr fyri atgongumerki, var hugurin til bara at fara heimaftur og einki fáa fyri peningin, lítil.So vit spurdu gentuna, ið har stóð, hvat vit so kundu gera við frakkan og jakkan, ið høvdu fartelefonir og aðrar virðislutir í. Hon bað okkum leggja teir móti vegginum, beint við garderobu-borðið, men noktaði at hyggja um nakar tók tingini. Tað gjørdist so einki við tað, so vit fóru út á gólvið at dansa,men hugdu oftani til jakkarnar. Tá ið dansurin so endaði, fóru vit beina leið aftur til jakkarnar, men sóu tá, at alt av virði varð stolið úr teimum. Vit vóru skelkaðar. Fartelefonirnar hjá báðum, báðar nýggjar, mappan, lyklar og so framvegis. Tað fyrsta, vit gjørdu, var at læna telefonina frá einum, og royna at ringja á okkara telefon, men tær vóru báðar sløktar. Tað mundu tjóvarnir hava gjørt. Ringdu so til politiið, ið bað okkum koma á støðina í morgin. Vit kunnu einki gera uttan at bíða .... men vónin er ikki tann stóra

**Góða nátt!**



**Góða dagbók**

Veðrið er sera gott. Sólin skínur og tað er eitt lítið lot av eystri. Hann er høgur í ættini. Í dag skulu vit venja kl. 17.30

Eg var eitt sindur seinur, tí eg hevði verið á floti. Vit høvdu fingið umleið 600 pund og støddin var góð. Vit fóru norður um Suðuroyar Klettin á Norðoyggjum. Fanin galið tú, har var ein ásins rúgva av øllum góðum. Eg hevði ikki peiling av, hvat tað var.

Vit lærdu nakrar nýggjar kombinatiónir í venjingini, so tíðin fleyg bara. Síðan sótu vit í umklæðingarrúminum og reypaðu um, at vit høvdu vunnið á unglingunum.

Nú er klokkan so nógv, at eg má fara at leggja meg. Eg skal á flot aftur í morgin. Og so kemur fjall gongu tíðin. Jú, vit bygdafrell, vit hava úr at gera. Tað skulu tit bara vita.

**Góða nátt**

**Góða dagbók**

Mánamorgun. Eitt er, at tað er mánamorgun, men tá eg hugsi um sunnudagin, dagin í gjár, ja so fái eg gron.

Hondbóltsdystur á Skála. Ein ræðuligur dystur. Dómararnir vóru eftir okkum í heilum. Annar also. Hin kundi brúkast.

Fyri tað fyrsta so fekk okkara málverji reyða kortið, meðan hon sat á bonkinum og mutlaði fyri seg sjálva. Og so var ballið byrjað. Har regnaði niður yvir okkum við útvísingum og brotskøstum í hópatali. Sjálvt venjarin hjá mótstøðuliðnum sat og smá flenti. Eg spyrji: "Er hetta rættvíst???" og svarið er:"NEI"

So halda tit, ið hetta lesa, at vit eru taparsligar, men tað eru vit ikki. Vit taka handan ósigurin sum R TTAR KVINNUR. Og høvdu tit verið har, so høvdu tit fingið sjón fyri søgn.

Tó, seinni um kvøldið batnaði lagið. Vit sótu at enda og flentu at hasum stakkals ólukkudýrinum í gráari skjúrtu, svørtum buksum og lakkskóm. Og sum við floytuni helt seg duga at døma eftir egnum reglum.

Mánamorgun, á jú lívið er vert at liva. Eftir eru mangir dystir og satt at siga, so fara vit eisini at vinna nakrar av teimum.



<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

## Vit skriva:

»Konufólk duga ikki at koyra bil« Hvussu ofta hevur hesin setningur ikki verið at hoyrt? Er tað bert ein pástandur ella er tað veruliga hald í hesum? Ber tað til at skera øll konufólk um ein kamb, tá tað kemur til bilar og siga, at tær ikki duga at koyra bil ella yvirhøvur hóska saman við einum bili?

<ph_1> hevur hesuferð sett sær fyri at kanna, um nakað hald er í hesum. Vit hava tosað við fólk, sum eiga at vita eitt sindur um hetta evnið og spurt tey, hvat tey halda um hesa mytuna, at konufólk og bilar eiga ikki at standa saman í einum setningi.

Men hví er tað soleiðis? Hvør er tann, sum av fyrstan tíð hevur sagt tey nú so kendu orðini, at konufólk duga ikki at koyra bil - at konufólk og bilar ikki hóska saman – at konufólk og bilar eru sum eldur og vatn?

Tað kann tykjast ikki sørt ørkymlandi, at øll konufólk beinanvegin verða stemplað sum vánaligir bilførarar. Tað kann heldur ikki verða rætt, at konufólk per definitión eiga at duga verri at koyra enn menn.

Ein kundi trúð, at talan var um eitt serligt gen, sum varð sproytað í mannfólk, ella sum mannfólk fingu av sær sjálvum, meðan tey lógu í móðirlívinum. Ella soleiðis fáa fólk tað ofta at ljóða.

Eyðkent er tað, at um ein bilur koyrir spakuliga eftir landsvegnum ella um ein bilur stendur vánaliga parkeraður, at so verður tað beinanvegin sagt, at hatta má hava verið eitt konufólk. Men er tað nú altíð tað?

At bakka, at duga at parkera – paralellparkera, ella hvat tað skal vera. Konufólk verða ofta løgd undir, ikki at duga. Tá menn parkera eitt sindur ófantaliga, siga fólk, at nú skundaði hann sær, og tað verður síðani sagt, at verða grundin fyri, at parkeringin varð, sum hon varð.

Hinvegin verður tó ofta sagt, at mannfólk brúka bilar sum leikutoy, og at teimum dámar alt ov væl at koyra skjótt. Hetta er jú eins skeivt, sum at siga, at øll konufólk ikki duga at koyra. Ein noyðist at ansa sær við generaliseringum.

Tá tað kemur til at arbeiða upp á bilin, sum til dømis at skifta dekk, at seta píkar upp undir, at skifta perur, so eru konufólk ofta nógv meira hjálparsleys enn mannfólk. Tá verður ringt eftir onkrum manni, sum dugir at skifta dekk ella peru, ella hvat tað nú skal verða. Veruleikin er helst tann, at tað eru nógv konufólk, sum eru avbera fegnar fyri, at mannfólk eru, sum kunna taka sær av øllum tí praktiska við einum bili. Men sjálvar vilja tær koyra kortini.

Niðurstøðan út frá øllum hesum má tí enn einaferð verða, at tað er ikki skilagott at skera øll um ein kamb, tí tað ber ikki til.

<ph_1>



## <vangamyndin/rúni/jákupsson>

# Náttarravnur uttan d og uttan ð



**hann er vælkendur millum føroyingar, sum tann altíð so vælupplagdi verturin í ymiskum útvarpssendingum. Millum annað kunnu nevnast Náttarravnarnir, Bitar úr Billboard og ikki at gloyma Barometrið. Men hvar og hvussu byrjaði so alt?**

Rúni Jákupsson starvaðist í fløguhandlinum Tutl í SMS. Telefonin ringdi ein dagin, og tá var tað Ovi Olsen frá útvarpinum, sum stóð og manglaði ein vert til nýtt og gott gamalt. Ein sending við tónleiki. Og Rúni sigur, at tað helst var ein tilvild, at hann fekk møguleikan, tí Ovi ringdi og spurdi eftir einum, sum ikki var til staðar tá.

- Og so spurdi hann meg, um eg hevði hug til at royna. Og tað hevði eg, so tað var byrjanin, greiðir Rúni frá.

Um tað mundið koyrdi Náttarravna sendingin upp á tað besta, og tá so annar av vertunum tá, tann nú so vælkendi Heri Jacobsen, valdi at gevast við Náttarravnunum, spurdi Heðin Arge, Rúna, um hann vildi taka yvir.

- Mær dámdi sera væl ta sendingina og tað konseptið, sum vit høvdu tá.

Aðrar sendingar, sum Rúni hevur verið við í ella gjørt sjálvur, eru Studio 4 og Bitar úr Bilboard. Eisini hetta vóru sendingar, sum avbera mong lurtaðu eftir. Sendingin Bitar úr Billboard var ein tónleikasending. Í hesi sending hevði hann valt eitt ár, har hann spældi øll løgini, sum høvdu verið nummar eitt á Bilboard tað árið. Umframt tónleikin hevði hann so eisini leitað sær tilfar fram um hesi ymisku løgini.

## barometrið

Summarskráin hjá Útvarpinum er nú farin aftur um bak, og tann heilt stóra sendingin í farnu summarskrá, var uttan iva Barometrið. Og eisini har var Rúni Jákupsson ein av vertunum. Hann sigur, at hann og Bjarni Mohr vórðu spurdir, um teir ikki kundu gera eina seinnapartssending gjøgnum summarið. Teir settu seg so niður at finna upp á okkurt, og eitt tað fyrsta, teir hugsaðu var, at tað kundi verið gott við fleiri vertum. Heri Jacobsen vísti seg at vera áhugaður í at verða við. Og so kom hugskotið við at hava tveir vertir inni og tveir úti. Og tá kom Kári Sólstein so eisini við.

- Vit gjørdu av, at sendingin skuldi vera merkt av spontaniteti. Tað vil siga, at Barometrið skuldi verða ein sending, sum ein ikki visti frammanundan, hvussu hon fór at verða, sigur Rúni.

Tá Barometrið so hevði koyrt í eina tíð, gjørdist tað alt meiri greitt, at talanin her var um eina sera vælumtókta sending.

- Vit høvdu so avgjørt ikki væntað, at sendingin fór at verða so vælumtókt, sigur Rúni, sum er stórliga bilsin av móttøkuni, sum sendingin fekk.

- Tað eru altíð onkur ting, ein ikki er nøgdur við í eini sending, men tað er bara so, sigur Rúni. Her sipar hann til Alnótspurningin í Barometrinum, sum vísti seg at blíva til eina kapping, har tað sum oftast vóru tey somu, sum ringdu inn og svaraðu spurningunum.

Spurdur um, hví teir høvdu valt at deila seg sundur, sum teir gjørdu í sendingini, svarar Rúni, at tað ongantíð var nakar ivi um, at tað skuldi vera teir ósmædnu, sum fóru út við mikrofonini, meðan Bjarni og Rúni sjálvir krógvaðu seg handan tað grøna borðið í studionum.

Sum heild sigur hann seg dáma sera væl at arbeiða í útvarpinum.
- Men útvarpsarbeiðið er, tá alt kemur til alt, ikki øðrvísi enn onnur størv. Tað er sera spennandi, serliga í fyrstuni, og tá hevði tú óivað kunnað arbeitt uttan løn, tí tær dámar tað so væl. Men so kemur eisini ein tíð, har tú verður troyttur av tí, og tá er tað ikki stórt øðrvísi enn onnur størv, heldur Rúni.

Men tað kann ganga út yvir tað sosiala lívið, tá ein ger sendingar hvørt vikuskiftið. Men tað letur ikki til, at Rúni hevur ilt av tí.

- Tá ein ikki hevur frí um vikuskiftið, so veit ein, at frídagurin ella dagarnir koma eina aðrastaðni í vikuni. Og tað er heldur ikki so galið, heldur hann.

- Mær dámar væl henda miðilin. Tað er lætt at gera útvarp í mun til eitt nú sjónvarp, heldur Rúni og leggur aftur at, at tað ber væl til at gera eina útvarpssending upp á stutta tíð.

Men hóast hann, tá hann var lítil altíð hevði ætlanir um at verða journalistur, so hevur hann lagt tær ætlaninar til síðis nú.

- Nei, tað verður ikki journalistur, sigur hann sannførdur á málinum.






| | |
|---|---|
| **Navn:** | Rúni Jákupsson Jakobsen |
| **Aldur:** | 28 ár |
| **Starv:** | Programmedarbeiðari í ÚF |
| **Føðingardagur:** | 01.05.1974 |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stórur, tá tú vart lítil?** | Journalistur |